# Mouritsen koyra býbussar



*Hetta er skrivið, ið býráðið fekk frá undirritaðu bussførarunum. Teir ynsktu at verða hoyrdir, men meirilutin í býráðnum helt, at teir høvdu havt møguleikan*

**Tórshavnar býráð hevur samtykt at taka av tilboðnum hjá Mouritsens bussum og Gundurs bussum fyri bussleiðina. Hetta eru tó ikki øll so fegin um**

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ
*Heri á Rógvi*

Tórshavnar býráð samtykiti á býráðsfundi hóskvøldið, at taka av tilboðnum frá Mouritsen bussum og Gundurs bussum uppá bussleiðin í Tórshavnar kommunu.

Nakrar tingingar skulu tó gerast, áðrenn tilboðið endaliga verður tikið av.

Jan Christiansen, býráðsformaður, segði á býráðsfundinum, at tað mest vóru formalitetir, ið skuldu fáast uppá pláss, og talan neyvan gjørdist um tær nógvu tingingarnar.

Tilboðið frá Mouritsens bussum og Gundurs bussum er áljóðandi 10.710.843,00 kr. fyri at røkja bussleiðina í Tórshavnar kommuna, t.e. leiðirnar 1,2 og 3. Harumframt leið 4/4x og skúlaleiðini. Koyrt verður eisini sunnudagar.

Klára Mourtitsens bussar og Gundurs bussar ikki at standa við tilboðnum, so verður tað Gunnleifs bussar, sum eiga næst lægsta boðið, ið fær bussleiðina at røkja.

Tilboðið frá Gunnleifs bussum er 11.763.400,00 kr. - góða millión dýrari enn tilboðið hjá Mouritsen og Gunduri.

Hetta merkir eina sparing aljóðandi 3,5 mió.

Jan Christiansen segði á býráðsfundinum, sum var hóskvøldið, at vitast skuldi, um tilboðið frá Mouritsen bussum var realistiskt, t.e. kann førast út í lívið, og kann Mourtitsens bussar standa við sínum tilboðið. Verður hetta ikki so, so er kvívskarpt, at Gunnleif sleppur til.

Býráðið samtyki at taka við tilboðnum frá Gunduri og Mourits við sjey atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Avtalan er galdandi í sjey ár. Talan kann gerast um ein vøkstur ella minking í koyritímum uppá 10%.

Koyrt verður yrkadagar frá 7 til 23, leygardagar frá 7 til 17 og sunnudagar frá 10-18.

### Orðaskifti

Orsakað av stóra áhuganum fyri málinum, varð málið um bussleiðina tikið fram um á býráðsfundinum hóskvøldið.

Uppskotið hjá meirilutanum varð sum nevnt samtykt, men minnilutin gjørdi sína støðu kenda.

Leivur Hansen og Jógvan Arge, báðir valdir fyri Tjóðveldisflokkin, gjørdur greitt, at teir als ikki vóru glaðir fyri, at lagnan hjá bussleiðini gjørdist hendan. Teir ynsktu at spardi peningurin heldur skuldi nýtast til at menna bussleiðina fyri.

Jan Christiansen vísti kritikkinum greitt aftur. Hann segði, at teir høvdu havt teirra tíð at gera viðmerking, og støðið var tikin til málið. Tikið verður nú av einum tilboði, og útbjóðingartilfarið er liðugt viðgjørt.

Minnilutin segði seg vera fyri, at bussleiðin verður boðin út, men viðgerðin var í sambandi við hetta málið var út av lagi vánalig, hildu teir.

Eisini var gjørt nógv burturúr einum túri til Reykjavíkar, ið tekniska nevnd og partar av umsitingini gjørdur nakað áðrenn løgtingsvalið. Jógvan Arge og Leivur Hansen, sum tá vóru limir í tekniskunevnd, hildu túrin vera oyðsl, sambært Jan Christiansen, og komu ikki við.

Tað var eftir øllum at døma á hesum góða túri, at útbjóðingartilfarið var gjøgnumgingið og diskutera.

### Bussførarar ósamdir

Á býráðsfundinum hóskvøldið vóru nógvar bussførarar at finna millum áhoyrarnar.

Áðrenn fundin hevði ein skari av tólv føraran gjørt vart við sína misnøgd. Ein av teimum tólv vildu seinni verða tikin av aftur listanum yvir avsendarar.

Tað var týðuligt, at teir vóru alt annað enn nøgdir.

Skrivið frá bussførarunum er at síggja aðrastaðni á síðunum.



*Meirlutin í Tórshavnar býráð stóð sterkur á býráðsfundinum og fekk trumfa sítt ígjøgnum.*

*Mynd: Heri á Rógvi*

# Barnagarður í Kollafirði



*Tað eru hesi húsini í Kollafirði, ið Tórshavnar kommuna hevur keypt til barnagarð*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

TÓRSHAVNAR BÝRAÐ
*Heri á Rógvi*

Á býráðsfundinum hóskvøldið samtyki Tórshavnar býráð eisini uttan atkvøðugreiðslu at keypa eina hús í Kollafirði, sum skulu nýtast til barnagarð.

— Vanliga eru ráðgevandi nevndirnar ógvuliga skeptiskar at tilmæla okkum at keypa sethús til barnagarð. Men í hesum førinum metti ein ráðgevandi nevnd, at húsini vóru ógvuliga væl egnaði til endamálið, sigur Jan Christiansen.

Talan er um eini sethús í tveimum hæddum, ið báðar eru 153 m2. Afturat hesum er stórt øki rundanum húsini.

Kostnaðurin er 1,2 mió. Afturat hesum verður umleið ein millión nýtt til at gera húsini klár til barnagarð.

Umleið 25 børn fara at ganga í barnagarð í húsunum. Borgarstjórin metir, at hetta er væl sloppið í mun til kostnaðin fyri hvørt barnagarðspláss aðrastaðni í Havnini.

## Fíggjarætlan framløgd

Á býráðsfundinum hóskvøldið varð eisini uppskot til fíggjarætlan framlagt fyri býráðslimunum.

— Talan er um eina fíggjarætlan, sum umsitingin hjá býráðnum hevur gjørt. Hetta vísir okkum, hvussu nógv tað kostar at reka kommununa, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri.

Hann sigur, at hetta skal vera at meta sum eitt slag av einari beinagrind hjá býráðnum og nevndunum, sum nú fara undir at viðgera og gera tilmæli.

Endaliga fíggjarætlanin skal samtykjast tvær ferðir av býráðnum við tveimum vikum ímillum.



# Mugu hava styrki og vilja at fara út um landoddarnar

**- Mystifiseringin av oljuvinnuni er farin. Fyritøkurnar eru við at finna út av, hvat tað snýr seg um. Tær gloriøsu vónirnar til oljuvinnuna eru vornar nógv meira realistiskar. Hetta er ikki so nógv øðrvísi enn at fáast við aðrar vinnur. Spurningurin er nú, um fyritøkurnar hava styrki og vilja til at fara út um landoddarnar og at vera tænastuveitarar heldur enn bara at veita tænastur til ta vinnu, sum hevur útgangsstøði í Føroyum sigur Magni Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum**



*Magni Arge, stjóri í Atlantsflog og formaður í Oljuvinnuráðnum á oljuframsýningini ONS í Stavanger: -Tær gloriøsu vónirnar til oljuvinnuna eru vornar nógv meira realistiskar*

*Mynd Jan*

OLJA OG VINNA
*Jan Müller*

Magni Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum hjá Vinnuhúsinum var millum føroyingarnar, sum vóru á altjóða oljumessuni í Stavanger nú um dagarnar. Nú vinnan sjálv hevur fingið til uppgávu at stíla fyri føroyskari luttøku á slíkum framsýningum sigur hann, at Menningarstovan hevur gjørt eitt gott arbeiði øll árini við at profilera Føroyar á framsýningum uttanlands. Menningarstovan hevur lagt grundarlagið. Hann staðfestir samtíðis, at man nú er komin til eitt vegamót, har tað fyrsta forvitnið um oljuvinnuna er av, og tey, sum nú eru við á oljumessu eru tey, sum hava eitt ella annað ítøkiligt samstarv á økinum. Hetta er eisini orsøkin til, at luttøkan er minni enn fyrr. Hann heldur tó ikki at hetta er nakað negativt men skal síggjast sum ein náttúrligt menning, at tey, sum fáa eitt ítøkiligt samstarv, eru tey, sum halda fast, meðan hinar fyritøkurnar, sum hava fingið mettað sítt forvitni, eru meira sjáldsamir gestir á slíkum stevnum.

Hann heldur tað eisini vera náttúrligt, at vinnan tekur við eftir Menningastovuna, tá hon hevur arbeitt tað upp. -Og tað eru tær royndirnar vit gera nú. Vit hava nógv at læra eitt nú á hesi framsýningini, tí tað eru ting vit kunnu gera betri.

Magni Arge, sum hevur roynt at loddað dýpið á framsýningini í Stavanger við at tosa við fólk, heldur, at tað er týðuligt, at áhugin er merktur av, at tað hevur ikki verið nakað virksemi á føroyska landgrunninum av týdningi í ár. Tað er eisini týðuligt, at Føroyar eru farnar aftur um. Eftir tær fyrstu boringarnar er tað ein meira avmáldur áhugi fyri Føroyum, enn tað hevur verið. Nú er tað meira ein spurningur um, at føroyskar fyritøkur royna at koma sær inn í oljuvinnuna í Norra, Onglandi og Danmark, sum drívið verkið heldur enn tann heilt stóri áhugin sum var hjá øðrum feløgum at etablera seg í Føroyum. Hetta kann sjálvandi broytast til næsta ár.

### Fáið fatur á kontraktarunum

Men er tað ikki ringt hjá føroyskum fyritøkum at koma inn á útlendska marknaðin?

- Vit eru við tíðini komnir eftir, at tað, sum er avgerandi, er at fáa samband við tey størru kontraktorfeløgini, sum oljufeløgini brúka. Har vit fyrr kanska meira hava havt samband beinleiðis til oljufeløgini, so er tað ikki tann vegin tær smærri føroysku fyritøkurnar skulu inn. Tær skulu inn gjøgnum stóru undirveitararnar, sum arbeiða fyri oljufeløgini so sum Schlumberger, Kværner, Ager, Halliburton, riggfeløg osfr., sum eru tey, ið fáa sáttmálarnar. Hesi fara so aftur til aðrar undirveitarar, og tað er har vit skulu vera klárir at lofta uppgávum.

Í hesum sambandi nevnir Magni fundin, sum føroysku fyritøkurnar á ONS høvdu við Statoil og sum snúði seg nettupp um hetta at kunna fáa sáttmálar fyri tey ymsu økini. Hann heldur eitt hugskot vera, at Statoil kemur at luttaka á oljuráðstevnuni, sum sannlíkt verður tann seinasta mikudagin í november í Føroyum. Tá kunnu teir hava við sær nakrar av teirra sentralu veitarum, og man kann fáa skipað eina workshop millum føroyskan mekaniskan ídnað og kontraktorfeløgini fyri at vita, um man kann fáa eitt samstarv.

Men tað liggur ótrúliga nógv í hondunum hjá teimum føroysku fyritøkunum sjálvum, um tær vilja sleppa framat í oljuvinnuni heldur formaðurin í Oljuvinnufelagnum. Tú mást brúka orku uppá tað og eisini finna teg í, at tú ikki kemur at vinna nógvan pening ta fyrstu tíðina. Men fær tú fótin inn um og fær nakrar royndir, so fær tú eisini ment teg. Og finnur tú nakrar røkur, hvar tú kanst vera ein veitari, so er tú innan fyri oljuvinnuna. Ger tú ikki tað, so er tað kanska ikki so áhugavert at vera í hesi vinnu og tú skal halda teg til fiskivinnuni ella annað.

### Varsemi við íløgum

Magni Arge heldur tað vera sera skilagott, at føroyskar fyritøkur bara brúka part av síni orku og tíð til at vilja fara upp í eina oljuvinnu. - Tú mást ikki gera íløgur nú í hesa vinnu tí tú roknar við at fáa eitt avkast, tí oljuvinna verður ein stór vinna í Føroyum. Tað vita vit ikki, um hon verður. Men eru tað hinvegin summir, sum finna fram til, at teir megna uppgávur saman við kontrakatarum aðrastaðni, so kann tað gott vera, at teir kunnu byggja upp eina forrætning, sum ikki neyðturviliga nýtist at verða bundin at, hvat hendir í Føroyum.

Í heila tikið heldur formaðurin í Oljuvinnufelagnum, sum sjálvur hevur fylgt oljutilgongdini neyvt tey mongu seinastu árini, at mystifiseringin av oljuvinnuni er farin. Fyritøkurnar eru við at finna út av, hvat tað snýr seg um. Tær gloriøsu vónirnar til oljuvinnuna eru vornar nógv meira realistiskar. Hetta er ikki so nógv øðrvísi enn at fáast við aðrar vinnur. So er tað spurningurin um fyritøkurnar hava styrki og vilja til at fara út um landoddarnar og at vera tænastuveitarar heldur enn bara at veita tænastur til ta vinnu, sum hevur útgangsstøði í Føroyum.

- Eg haldi man kann altíð royna at finna tað positiva í tí gongd, sum hevur verið. Tað vildi verið ein vandi, um alt varð yvirupphitað, tí tingini gingu ov skjótt. Tað er ein fyrimunur finna vit olju, tí tá hava vit eitt annað bein eisini, so eg vóni, at tað fer at eydnast.

Magni Arge heldur tað mest spennandi vera, um tað eydnast nøkrum fyritøkum at koma framat og kunna arbeiða í oljuvinnuna, gera seg dugnaligar og verða virðismettar av øðrum kontraktørum, og sum so kunnu levera eisini uttan fyri Føroyar. Eydnast tað einum ella tveimum teirra, so vísa tær fyritøkurnar eisini vegin fyri øðrum føroyskum fyritøkum, sum kunnu fylgja aftaná. Tað er tað vit seta okkara vón til. Eru tær uppá pláss og tingini so vaksa í Føroyum, so hava vit so einastandandi góðan møguleika at fáa okkara fyritøkur í størri mun involveraðar í einum oljuídnað, sum verður her heima hjá okkum sjálvum.



*Umboð fyri føroyskt vinnulív vitja á Statoilhøvuðsstøðini í Stavanger at kunna seg um, hvussu norska oljufelagið ber seg at, tá tað ger sáttmálar við undirveitarar*

*Mynd Jan*